

*Rannvá Kunoy fekk í fjør 60.000 krónur úr Grunni Thorvalds Poulsen*

# Gávugóðs Thorvalds verður latið fríggjadagin

GÁVUGÓÐS
*Tíðndaskriv*

Fríggjadagin 8. februar klokkan 14. verður aðru ferð gávugóðs latið úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum. Gávugóðsið verður latið á føðingardegi Thorvalds

Endamálið hjá grunninum er at stuðla og eggja ungum fólki við listarligum hegni til útbúgving.

Thorvald Poulsen av Steinum var gartnari í Havn. Hann hevði stóran áhuga fyri bókmentum og list, og hann stovnaði grunnin, sum ber navn hansara.

Nevndin í grunninum er mannað við rektaranum á Fróðskaparsetrinum, sum formanni, formanninum í LISA og formanninum í lærarafelagnum. Tey eru í løtuni, Malan Marnersdóttir, Oddfríður Marni Rasmussen og Elsa Birgitta P. Petersen.

Í fjør fekk Rannvá Kunoy 60.000 krónur úr grunninum. Rannvá Kunoy er listakvinna í London.




# Jastrid í Gallarí Riberhús í Fuglafirði

FOTOFRAMSÝNING
*Tíðndaskriv*

Frá leygardegnum 9. februar til mikudagin 20. februar verður fotomyndaframsýning á Gallarí Riberhúsi í Fuglafirði. Tað er Jastrid á Dalbø ið sýnir fram.

Jastrid er fólkaskúlalærari og starvast við Fuglafjarðar skúla. Hon hevur altíð havt stóran áhuga fyri myndlist og hevði evning sum linjulærugrein á Føroya Læraraskúla.

Jastrid hevur fyrr luttikið á Varmakelduframsýningum við málningum og fotomyndum. Hetta er fyrsta ferðin hon hevur egna framsýning, og eru tað fotomyndir, ið her verða vístar fram. Myndaevnini eru fjølbroytt. M. a. verða gerandislív, trúgv og deyði lýst. Nógvar av myndunum, ið bæði eru í litum og svart/hvítar, eru úr nærumhvørvinum.

Framsýningin letur upp leygardagin 9. februar kl. 14.00.

Við setanina fara starvsfelagar hjá Jastrid at seta dám á løtuna. Alexandur Kristiansen lesur egnar yrkingar og Eyðun & Marta á Lakjuni fara at leika á klaver og cello.

Gallarí Ribarhús hevur opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 17.30 leygardag frá kl. 16.00 til 18.00 og sunnudag frá kl. 15.00 til 18.00.

# Læra kvinnur at stovna egið virki

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur gjørt av at stovna eina skipan, sum skal fremja møguleikarnar hjá kvinnum at stovna egið virki

– Mangt bendir á, at kvinnur við góðum vinnuligum hugskotum mangan halda seg aftur at fremja ætlanirnar í verki. Tí verður stig tikið til hetta serstaka átak at fjølbroyta føroyska vinnulívið, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Endamálið við verkætlanini er at skipa fyri skeiðum, har dentur verður lagdur á:

· at kvinnur verða kunnaðar um, hvussu ein fyritøka verður stovnað og rikin,
· at gera kvinnur førar fyri at arbeiða við og fremja egin hugskot,
· at leiðbeina um, hvar vitan fæst um vinnu,
· at gera eitt samstarvsnet millum kvinnur í somu ella líknandi støðu og millum vinnuhugaðar kvinnur og vinnulívið.

Miðað verður eftir, at luttakararnir fáa holla vitan um endamálið við atliti at:

1) marknaði,
2) fígging,
3) innkeypi,
4) vørustýring,
5) hvussu semjur verða gjørdar o.a.

Tá ið skeiðið er liðugt, hava luttakararnir gjørt eina virkisætlan, sum tekur støði í rakstri av egnari fyritøku.

– Ætlanin við átakinum »Kvinnur sum íbirtarar« er at eggja kvinnum at luttaka í handils- og vinnulívinum og soleiðis eisini stuðla upp undir, at javnvág verður millum kvinnur og menn í býtinum at eiga og reka fyritøkur, sigur landsstýrismaðurin.

Kvinnur sum íbirtarar verður skipað sum skeið við ásettum tímatali um vikuna í ávíst vikutal. Kvinnur, sum eru sjálvvinnurekandi, kunnu eisini luttaka og fáa leiðbeining um vinnuligar framtíðarmøguleikar.

Fyrilesarar/leiðbeinarar vera fólk úr vinnulívinum og vinnuskúlunum við royndum í ráðgeving.

Byrjað verður primo 2002. Skeiðið verður lutað sundur í fyrilestrar og uppgávutímar. Í uppgávutímunum verður dentur lagdur á, at luttakararnir gera virkisætlanir, sum kunnu taka støði í egnum verkætlanum.

Ymiskar vinnufyritøkur, herundir fíggjar- og tænastufyritøkur, vitja á skeiðnum. Kvinnur, sum hava stovnað og rikið vinnufyritøkur, vitja og greiða luttakarunum frá sínum vinnuroyndum.

Skipanin verður fíggjað partvís við luttakaragjaldi og partvís við stuðli úr Vinnuframagrunninum, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.



